

## Klaksvíkskappingin um vikuskiftið

Aftur í ár fer Klaksvíkar Ítróttarfelag, at fyriskipa Klaksvíkskappingini, ið er kapping millum trý tey ovastu liðini í landskappingini, árið frammanundan, og so vertirnar úr KÍ. Í ár verður talan um NSÍ, EB/Streym, B36 og KÍ, ið fara at kappast um heiðurin, ið HB vann sær í fjør. Sum nakað nýtt, hevur KÍ í ár valt at fyriskipa einari serligari kapping fyri »Føroya bestu dreingjum«, ið er kapping millum bestu liðini úr Dreingjadeildini í føroysku kappingini. Her er talan um liðini TB/VB, HB og KÍ. Hensin nýggi táttur byrjar leygarmorgunin klokkan 9:00, og síðani fara ymisk fjølbroytt tiltøk at mynda vikuskiftið í Klaksvík. Millum annað verða ymsar forkunnugar vitjanir í Café KÍ, har gott ábit eisini er at fáa. Vit kunnu nevna, at millum gestirnar á Café KÍ vera millum annað Eyðun Klakstein, Uni Arge, Heðin Askham, Johan Nielsen og Sigfríður Clementsen

# Sí ikki ráð at tapa

**Hóast tað eru heili sjey stig á muni á stigatalvuni, so verður tað alt annað enn ein lættur dystur hjá SÍ monnunum um vikuskiftið, tá Fleyr koma á vitjan í Sørvági**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Bert ein dystur verður um vikuskiftið, og er tað brakið millum botn og odd, tá havnaliðið Fleyr fer til Sørvágs á vitjan. Skulu Sørvingar gera sær nakrar vónir um at vinna FM-heitið, og harvið greipuna, so er tað eitt ófrávíkiligt krav, at teir vinna heimadystin móti botnproppinum Fleyr.

### Styrktir munandi

Tað verður tó ikki bara sum at siga tað. Hóast Fleyr var dragnað heilt nógv, so hevur liðið, síðan tað varð styrkt við trimum leikarum úr Fram, prógvað, at teir kunnu gera lívið súrt at liva hjá mótstøðumonnum sínum, og tað ætla teir sær ivaleyst aftur at gera hesaferð.



### Vunnu seinastu uppgerð

Fyrsti dystur í seinnu hálvu av kappingini, tá Fleyr spældu ein av sínum fyrstu dystum við nýggja styrkinum, eydnaðist tað heldur óvæntað havnamonnum, at vinna móti SÍ. Úrslitið tá varð 3-2, og nærum sum eitt mynstur hevur hvør dystur, við bert einum undantaki, endað við einum javnbrótara, ið avgerandi fimta sett vanliga verður rópt.

Síðan hendan dystin í Havn, hevur tað ikki hilnast havnamonnunum eins væl, og hava teir verið óhepnir, ikki at hava fingið onkran sigur afturat, háløðan niður í skjáttuna.

Dysturin um vikuskiftið hevur, orsakað av tøttu kappingini í oddinum, alstóran týdning fyri heimaliðið. Tí vinnur SÍ ikki, samstundis sum Mjølnir møguliga vinnur sínar írestandi dystir, ja so sær heilt væl út hjá klaksvíkingum úr Mjølni.

*Seinast SÍ og Fleyr møttust, tá endaði tað við einum heldur óvæntaðum sigri til havnaliðið. Javnbrótari skuldi til, áðrenn vinnarin var funnin, og tað ferðina var tað Fleyr, ið høvdu neyðuga hepnið. Skulu SÍ gera sær nakrar vónir um at vinna greipuna í ár, so er kravið onki minni enn ein sigur*

### Dráttur skal døma

Hjá kvinnunum verður tað vágaliðið Dráttur, ið skal standa á síðulinjuni í dystunum um vikuskiftið, og har verður helst størsti spurningurin, um oddaliðini bæði, SÍ og ÍF megna at halda stimanum uppi.

ÍF vitjar í Kollafirði, og SÍ fær vitjan av TB. Aðrastaðni fær Mjølnir vitjan úr Havn, tá Fleyr koma á vitjan.

**Dystirnar um vikuskiftið:**

**Hondbóltur**
*Atlantic Airways*

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 02.03 | 16:00 | Neistin-KÍF |
| 02.03 | 16:00 | StÍF-VÍF |

*Sunset*

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 01.03 | 15:00 | StÍF-VB |
| 02.03 | 14:30 | Neistin-VB |
| 02.03 | 14:30 | StÍF-VÍF |

**Flogbóltur**
*Meistaradeild, Kvinnur*

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 02.03 | 14:00 | KÍF-ÍF |
| 02.03 | 14:00 | Mjølnir-Fleyr |
| 02.03 | 14:00 | SÍ-TB |

*Meistaradeild, Menn*

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 02.03 | 16:00 | SÍ-Fleyr |

## Todi stovnar teldulið

**Sum fyrsta ítróttarfelag í Danmark fer FC Amager av álvara inn í sonevnda eÍtróttin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

FC Amager hevur nevnliga stovnað eitt eSport-lið, har børn og ung, ið gjarna vilja spæla FIFA 08, Counter Strike ella World of Warcraft á høgum stigi, kunnu hittast.

Todi Jónsson, sum er nevndarformaður og virkandi stjóri í felagnum, sigur, at tey síggja eSport sum ein spennandi møguleika.

- eSport er í størari menning, og hesum vilja vit fegin vera ein partur av. Tí hava vit sum fyrsta ítróttafelagið tikið stigið allan vegin, soleiðis at vit aktivt gerast ein partur av hesum. Okkara fatan er, at millum tey mongu ungu, sum spæla teldu, er ein stórur marknaður fyri eSport. Og í tøttum samstarvi við Dansk Computerforbund vilja vit arbeiða fyri at stovnseat eina eSport-ligu í Danmark, sigur Todi.

Eins og í einum vanligum fótbóltsfelag verða fleiri eSport-venjarar knýttir at nýggju verkætlanini hjá FC Amager.

VÍF-Kyndil 28-33 (13-20):

# Kyndil staðfesti veruleikan

**VÍF er nú mest sum matematiskt farið eina deild niður. Hóskvøldið taptu tær heimadystin móti Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað eydnaðist ongan tíð hjá VÍF at skapa nakran veruligan spenning, tá tær í eini seinastu roynd at bjarga Sunset-sessinum skuldu basa Kyndli.

Fyrsta korterið av dystinum fóru gestirnar við mest sum øllum, og tann munin hildu tær grønu fast um allan vegin.

Sum so ofta í vetur, so fekk VÍF eitt betri tak um dystin, tá fyrstu nervarnir vóru tveittir burtur, men Kyndil helt alla tíðina dystinum í einum jarntaki.

Enn eru tríggir dystir eftir at spæla hjá VÍF, men tað tykist ikki vera nakar møguleiki fyri, at teir dystirnir kunnu kasta neyðugu stigini av sær.

## FAKTA

**VÍF-Kyndil 28-33(13-20)**
10 min: 3-5
20 min: 6-12
40 min: 18-25
50 min: 23-29
**Málskjúttar**
**VÍF**: Ioana Rapa 10, Fríða Marjunardóttir 5, Liljan Djurhuus 4(2), Katrin Christophersen 2, Torgunn Johannesen 2, Heidi Joensen 2, Rannvá á Røgvu 1, Elisa Leo 1, Linda Johannesen 1
**Kyndil**: Lina Andriulyte 11(4), Jacklin Durhuus 5, Bjørg Syderbø 5, Ragnhild á Plógv Hansen 3, Eyðritt Andreasen 3, Randi S. Wardum 3, Tordis Tróndarson 2, Barbara Egilstrøð 1
**Brotskøst**: VÍF 5, Kyndil 5
**Útvísingar**: VÍF 1, Kyndil 2
**Dómarar**: Ragnar Simonsen & Hanus Kúrberg